SUNDA KOMMUNA

## Leys størv á Dagstovninum við Stórheygg

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík, 35 t/v, at byrja 16. februar 2009, ella eftir nærri avtalu.

Annað starvið er til smábarnagarðsstovu og hitt er til barnagarðsstovu.

**Vit ynskja, at tú hevur**
- hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum
- virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- hug til at skapa og seta dám á dagstovnin
- góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
- eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika
- ein stovn, ið er í støðugari menning
- eitt arbeiðspláss, har tú kemur at hava ávirkan

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Sunnrid Eyðunsdóttir Thomsen, leiðara, á tlf. 737250 ella 737255.

Umsóknir við avritum av prógvi v.m. skulu sendast beinleiðis til

**Dagstovnin við Stórheygg**
**Áarvegur 3**
**420 Hósvík**

ella við telduposti til: storheygg@sunda.fo

**Umsóknir mugu vera dagstovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. februar 2009.**

Í Sunda kommunu eru tríggir dagstovnar: á Oyrarbakka, í Hvalvík og í Hósvík. Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík hevur pláss fyri 58 børnum, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Leiðararnir á teimum trimum dagstovnunum hava eitt gott og tætt samstarv í samráð við kommununa.

KEYP · SØLA · MEKLING
GLARSMIDJAN.FO
tel: 31 06 23 · www.glarsmidjan.fo

## MÁLNINGAR TIL SØLU

Ruth Smith, Flora Heilmann,
Gudmund Hentze, Jack Kampmann (Kvívík)
Sí myndirnar á www.glarsmidjan.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Altjóða Skrivstovan
International Office

# TOEFL-roynd

## fríggjadagin 13. mars 2009

(Test of English as a Foreign Language)

Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum.

TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í enskmæltum londum.

Royndin verður fríggjadagin 13. mars 2009 kl. 10 á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3.

Tilmeldingarfreistin hjá TOEFL er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini, men mælt verður til at melda seg til í góðari tíð vegna avmarkað pláss hjá okkum.

Tilmelding fer fram on-line á: www.ets.org/toefl

Kostnaðurin er 155 USD.

ASK

| Altjóða Skrivstovuna | Fróðskaparsetur Føroya |
|---|---|
| tlf. 322065 | tlf. 352500 |
| ask@ask.fo | setur@setur.fo |
| www.ask.fo | www.setur.fo |

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# Bilvaskari

Starv sum bilvaskari hjá politinum í Tórshavn er leyst at seta frá 16. februar 2009.

Løn verður veitt eftir avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til telefon nr. 35 14 48.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. februar 2009.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 21. januar 2009
Karen Marie Olesen

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**

Føroya Náttúrugripasavn

## Skrivstovufólk til Føroya Náttúrugripasavn

Í sambandi við at okkara skrivstovufólk fer í annað starv, verður starvið hervið lýst leyst at søkja.

Føroya Náttúrugripasavn er stovnur undir Mentamálaráðnum og fevnir um Plantusavnið og Djórasavnið. Hesi søvn hava til endamáls at granska, savna, varðveita, handfara og sýna fram landsins náttúrusøguligu virði.

Viðkomandi skal taka sær av bókhaldi, journalisering og annars av vanligum skrivstovuarbeiði. Viðkomandi skal eisini kunna taka lut í øðrum arbeiði á Náttúrugripasavninum.

**Førleikakrøv**
Kravt verður at umsøkjarin hevur:
- Royndir í bókhaldi
- Góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
- Góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni
- Hevur umsøkjarin kunnleika til nýggju FSL-skipanina og starvsroyndir á økinum, er tað ein fyrimunur.

**Treytir**
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum mugu vera Føroya Náttúrugripasavni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2009.

Umsóknir skulu sendast til:

Føroya Náttúrugripasavn
V.U. Hammershaimbsgøta 13
100 Tórshavn

**Eru fyrispurningar um starvið – ringið til Náttúrugripasavnið á tlf. 352320 og tosið við Dorete Bloch, fyristøðufólk.**

Lesið Sosialin - so eru tit við

